*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

# i Dimmalætting í 65 ár



eingin Samuelsen við sínum góða penni eftir á Dimmalætting uttan Beata. Vónandi verður hon nakað enn.

### Serstakt heim

Lívið hjá Benny hevur ikki bert verið Dimmalætting. Hann hevur eisini havt álitisstørv. Hann var millum annað nevndarlimur í Húsalánsgrunninum í fleiri ár. Hann hevur spælt nógv sjónleik, verið við í fleiri útvarpsleikum og lisið skald- og stuttsøgur upp í útvarpinum. Hann spælir nógv bridge, og hann er ein av okkara mest royndu harumonnum.

Benny giftist við Sofiu, vanliga kallað Dúddan, f. Petersen, úr Kollafirði. Hetta var ikki minni fjølment ætt. Tey vóru ikki færri enn 13 systkin. Her kom ein nýggj politisk dimensión inn. Her vóru tey eisini tjóðveldisfólk, ikki minst svágurin og javnaldurin Janus!

Tey búsettust í teirra hugnaliga heimi í Magnus Heinasonargøtu í Havn í húsunum hjá langabbanum Georg Lindenskov.

Hetta var eitt serligt heim. Sum ofta var við hjúnum vóru tey bæði sera ymisk. Benny var tann meira friðarligi, meðan Dúddan var tann meira útvenda. Teirra heim gjørdist eitt savningarstað hjá báðum hesum stóru ættum. Higar komu tey at vitja og eisini at gista og búgva, tá ið komið varð til Havnar. Yngra ættarliðið tekur framvegis til, hvussu hjartaliga tey vóru móttikin heima hjá Benny og Dúdduni.

Tey fingu børnini Lindu, sum býr í Noregi, Andrass, sum býr í Havn og Steingrím, sum býr í Sørvági. Abbabørnini eru sjey og langabbabørn eru eisini komin. Tað er tikið til í familjuni, hvussu gott samhaldið var teirra millum. Hvønn mikudag ótu tey døgurða saman. Dúddan hevði eina stóra savning av "pipar og salt" bússum. So komu tey fast saman eina ferð árliga at vaska hesi íløt. Soleiðis hugnaðu tey sær saman.

Dúddan doyði í 1992, og hetta var ein stórur saknur. Nú vit hava havt ólavsøku kann verða nevnt, at til teirra kom øll familjan eisini á ólavsøku. Onkur tók um dagarnar til, at tað var einki við ólavsøkuni longur, nú Dúddan ikki var longur!

Benny er kendur fyri at vera eitt álitisfólk. Eg hevði sjálvur ein mammubeiggja Niels Juel, sum var prentari. Hann hevði nógv við Benny at gera og minnist eg enn, hvussu gott Niels Juel bar honum.

Ynskt verður Benny hjartaliga tillukku við teimum 80 árunum, sum ikki síggja út at tyngja hann á nakran hátt.

Móttøka verður í Havnar Klubba í morgin frá klokkan 11–16.

ó.

# Minningarorð um Tinu Brattaberg

Tung vórðu boðini vit fingu í mei, at Tina varð farin so brádliga.

Eg vil við hesum fáu orðum takka tær fyri alt, tú hevur verið fyri meg og alla familjuna. Takk fyri títt blíða og milda lyndi og tín smittandi látur. Takk fyri allar tær løtur vit fingu saman við tær. Takk fyri øll tey pløgg, ið tú hevur virkað til okkum og okkara børn, og ikki minst dukkurnar hjá mær. Alt so sera væl úr hondum greitt. Takk fyri tínar so vælsmakkandi smákakur, ið vórðu sum lítil listarverk.

Vit harmast øll um, at tú ikki verður við til brúðleypið leygardagin, tá sonur tín Arni veður vígdur síni Rakul, ið tú var so stolt av. Eisini harmast vit um, at tú ikki skuldi verða við, tá tey bæði lótu Torgið upp, hetta hevði tú glett teg til so leingi.

Altíð rósti tú synum tínum Eyðun, Arna og Kára og manni tínum Bjarna.

Eg veit teir saknað teg nakað so nógv. Vit hava djúpa samkenslu við teimum.

Við hesum vil eg lýsa frið yvir minnið um Tinu.

**Barbara**

**Føðingar**



21. juli fingu Katrin Madsen, Kambsdalur og Obele O. Onyebuchi, Skála, eina dóttur. Hon var 51 cm. long og vigaði 3785 gr.



27. juli fingu Fríða Rasmussen og Svein Waagstein Rasmussen, Keypmannahavn, eina dóttur. Hon var 49 cm long og vigaði 2776 gr.

22. juli fingu Anja Reginsdóttur Joensen, Argir og Nikolaj L. Eriksen, Lemvig, á Århus sjúkrahúsi ein son. Hann var 40 cm langur og vág 1450 gr.

23. juli fingu Alexandra á Dul og Ørvur Heinesen, Keypmannahavn, eina dóttur. Hon var 53 cm. long og vigaði 2820 gr. Hon eitur Emma.

25. juli fingu Sonja Bech og Christopher Paul Freeman, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 50 cm. long og vigaði 3250 gr.

25. juli fingu Guðrið og Leivur Jarnfoss, Tórshavn, tvíburar - gentu og drong. Gentan var 49 cm. long og vigaði 2550 gr. og eitur Eva. Drongurin var 48 cm. langur og vigaði 2650 og eitur Hákun.

26. juli fingu Gisleyg Poulsen og David Hafsteinsson, Skopun, eina dóttur. Hon var 58 cm. long og vigaði 4600 gr.

27. juli fingu Eydna Thomsen og Tryggvi Joensen Hentze, Sandur, ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 4000 gr.

28. juli fingu Beinta og Regin Hammer, Hoyvík, ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 3700 gr.

28. juli fingu Karin og Jørgin Davidsen, Glyvrar, eina dóttur. Hon var 50 cm. long og vigaði 2690 gr.

28. juli fingu Randi og Birgir Jakobsen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 53 cm. long og vigaði 3940 gr.

28. juli fingu Elinborg Nolsøe og Kári Gaardbo, Tórshavn, ein son. Hann var 55 cm. langur og vigaði 4045 gr.

---

Í dag, 1. august kl. 14.00 giftast í Kirkjubøar kirkju, Anna í Garði Patursson, Kirkjubøur og Jógvan Heinesen, Norðragøta. Brúdleyp verður fyri innboðin á Hotel Føroyum kl. 19.00.

Leygardagin 2. august kl. 15 giftast í Fríðrikskirkjuni á Toftum Dagbjørt Sólheim og Oleif Joensen. Veitsla verður fyri innbodnum á Svangaskarði kl. 19.

Leygardagin 2. august kl. 14.00 giftast í Fuglafjarðar kirkju Ása Poulsen og Bjarni Beder. Veitsla verður fyri innbodnum í B36 húsinum kl. 19.00.

Leygardagin 2. august kl. 13.15 giftast í Sædden kirke Fyrvej 30, 6710 Esbjerg, Kjarstein Stórhamar Danielsen, Trongisvágur og Karina Bruun Esbjerg. Adressan. Sædding Ringvej 1 - 7 , 6710 Esbjerg V.

2. august giftast í Kristianskirken Frederikshaldsgade 15 Århuus Gitte Rask Århuus og Erling Heinesen Vestmanna.

Leygardagin 2. august kl. 15.00 giftast í Vesturkirkjuni Guðrið Joensen og Janus Rustin Olsen, J. Paturssonargøta 44, Tórshavn. Veitslan verður fyri innbodnum í Argja Róðrarfelag kl. 19.00.

Leygardagin 2. august kl. 15.00 giftast í Hoyvíkar kirkju Randi Vestergaard, Hoyvík, og Jóhann Hansen, Gøtugjógv. Tey, ið ynskja at gleða okkum við at koma, eru hjartaliga vælkomin í Marinargøtu 19 frá kl. 19.



Leygardagin 2.8.08 kl. 16.00 giftast í Havnar kirkju Randi Næss Joensen, Tórshavn og Torbjørn Andrias Lisberg, Trongisvágur. Veitslan verður hildin fyri innbodnum í Pállstovu kl. 19.00.



Leygardagin 2. august kl 14.00 giftast Annika Kunoy Høgnadóttir, Klaksvík og Wonik Im, Korea í Betesda í Klaksvík. Drekkamuður verður aftana vígsluna og øll eru vælkomin. Veitsla verður á Sjómansheiminum í Klaksvík kl. 19.00 fyri innbodnum.



Leygardagin 2. august kl. 14 giftast í Ebenezer Noomi Schwartson og Eli Jógvanson Christiansen. Eftir vígsluna verður móttøka í niðara sali, har øll eru hjartaliga vælkomin. Veitsla verður fyri innbodnum í bygdarhúsinum í Leirvík kl. 19.



Leygardagin 2. august kl. 14.00 (ístaðin fyri kl. 15.00) giftast í Sjóvar kirkju Alisa Hammer, Strendur og Ási Joensen, Klaksvík. Drekkamuður verður eftir vígsluna, heima hjá foreldrunum á Strondum, øll eru vælkomin. Veitslan verður fyri innbodnum á Hotel Norð á Viðareiði kl 19.00.

**50 ár**

Í dag, 1. august verður Regin Olsen Klaksvík 50 ár. Vælkomst verður í húsinum hjá Norðoyar Kvinnufelag Bøgøta 3, frá kl. 18.

**Gullbrúdleyp**

Leygardagin 2. august kl. 18.00 halda Ása og Henrik Ovenberg gullbrúdleyp í skúlahølinum í Oyndarfirði fyri innbodnum.